E
Alt hitt gamla er at enda
E
Øll mín syndaskuld er gloymd.
H7
Fast til krossin syndin negld varð
E
Og í gloymskuhavið loynd.
E
Eg við langtan málið síggi
E7 A
Gleði fyllir sál og sinn.
E H7 E
Tí alt umbroyttist tá Jesus kom inn.

E7 A E
Tá Jesus kom inn, tá Jesus kom inn
E Cis Fis H7
Alt umbroyttist tá Jesus kom inn.
E E7 A
Eg kann ei greiða frá tí - sum hendi
E
Men eg veit, - at alt umbroyttist
H7 E
Tá Jesus kom inn.

2/3. Tað sum fyrr eg sá sum vinning
Eg síggi nú sum tap.
Tað ið fyrr mær vildi forða
Jesus vildi lyfta av.
Alt mítt egna strev og møði
Gav ei frið í sál og sinn.
Men alt umbroyttist tá Jesus kom inn.

3/3. Fylt av ótta var mítt hjarta
Tá eg ævinleikan sá.
Tí eg Guði skuldi møta
Uttan vón eg dómin sá.
Og eg sá tey frelstu gleðast
Men tann gleðin var ei mín –
Men alt umbroyttist tá Jesus kom inn